# Klipp eftir William Heinesen bjargast

**Vandi er fyri, at virðismiklu pappírsklippini eftir William Heinesen fara fyri skjeyti, um vit lata standa til. Tískil hevur Listasavn Føroya tikið stig til at fáa ein pappírskonservator til Føroya at eftirhyggja og umvæla hesi klipp**

LIST
*Turið Kjølbro*

Pappírsmyndirnar hjá Williami Heinesen eru virðismikil mentanargripur. Men pappírsmyndir hava tíverri avmarkaða livitíð, um tær ikki verða eftirhugdar og umvældar. Tískil hevur Listasavn Føroya gjørt eina ætlan um, hvussu hesi pappírsklipp eftir William Heinesen kunnu verða bjargað. Avtala er gjørd við danska pappírskonservatorin Tine Johannesen, sum 1. september kemur til Føroya í tveir mánaðir at arbeiða við klippunum hjá Williami Heinesen burturav. Heinesens Hús er latið til endamálið og fólk, sum eiga hesi klipp, kunnu venda sær til Listasavnið.

Konservatorurin kann vanliga ikki endurskapa eina mynd, ið er farin, men hann kann tálma ella steðga niðurbrótingini við at beina burtur tað skaðiliga límið og seta annað á í staðin, festa pappírsfláirnr, slætta og hampa um klippini og stegða skaðiligum smáverum. Eigararnir kunnu eisini fáa ráðgeving í, hvussu klippini eiga at verða handfarin fyri at verja tey ímóti niðurbróting.

Kendu klippini eftir William Heinesen eru nú vorðin 20-30 ára gomul. Flestu teirra eru í rættiliga ringum standi, og vandi er fyri, at hendan tjóðarogn fer fyri skjeyti, um vit lata standa til, sigur Bárður Jákupsson, leiðari á Listasavni Føroya í tíðindaskrivi. - Litirnir blikna og pappírið moyrnar. Serliga er tað límið, sum er sera óheppið. Sýra í líminum etur seg sum frá líður ígjøgnum pappírsfláirnr. Skulu verkini varðveitast til eftirtíðina, mugu tey undir serkøna konserveringshond skjótast til ber.

Meginparturin av litklippunum eftur William Heinensen er eginogn. Klippini hanga í stovum víða hvar um landið. Tey, ið eiga slík klipp, hava nú møguleikan at fáa gripirnar eftirhugdar og umvældar. Mong klipp eru uttanlands. Listasavnið heitir á fólk, sum vita um eigarar í útlegd um at boða frá so hesi eisini verða umvæld.



*Tey, ið eiga klipp eftir William Heinesen, hava nú møguleikan at fáa tey eftirhugd og umvæld.*
*Pappírsklipp »Lív« eftir William Heinesen frá um 1975, privatogn*

# Orðabókafrøðingar hittast

**- Tað hevur avgjørt týdning, at fólk sum arbeiða innan sama øki hittast, sigur Zakaris Hansen, samskipari av ráðstevnuni um orðabókafrøði, sum er í Norðurlandahúsinum**

ORÐABÓKARÁÐSTEVNA
*Turið Kjølbro*

Í dag byrjar norðurlendsk ráðstevna um orðabókafrøði í Norðurlandahúsinum. Føroyamálsdeildin á Fróðskaparsetrinum skipar fyri ráðstevnuni saman við Norðurlendskum felag fyri orðabókagerð og Málráð Norðurlanda. Eini 130 fólk úr norðurlondum og einstøk úr øðrum londum taka lut.

Tað hevur ivaleyst týdning fyri orðabókagerð í Føroyum, at ráðstevna í orðabókafrøði verður hildin í Føroyum. Eysæð er orðabókagerð ikki løtuverk, men tað at stór norðurlendsk ráðstevna um orðabókagerð verður hildin í Føroyum og ikki minst, at Mentamálastýrið hevur sett eitt veruligt framtak fyri orðabókagerð í gongd, fer uttan iva at føra við sær, at vit fáa fleiri orðabøkur millum føroyskt og onnur mál. Okkum tørvar nógvar orðabøkur, og hækkingin á løgtingsins fíggjarlóg bendir á, at fleiri fara at koma.

- Tað er ringt at máta, hvat ítøkiligt kemur burtur úr eini ráðstevnu sum hesari, men tað hevur avgjørt týdning at fólk sum arbeiða innan sama øki hittast, sigur Zakaris Hansen, samskipari av ráðstevnuni.

Ráðstevna um orðabókafrøði hevur síðani 1991 verðið hildin annað hvørt ár. Hetta er tann sætta í røðini og tann fyrsta, sum verður hildin í Føroyum. Endamálið hjá norðurlendska orðabókafelagnum er at fremja skipað samskifti og samstarv í Norðurlondum á orðabókafrøðiliga yrkisøkinum. Hyggja vit at skránni fyri ráðstevnuna, sum er rættiliga drúgv og umfatandi, sæst, at eitt nú tøknin stendur frammalaga. Ein fyrilestur er eitt nú um framtíðarinnar orðabók. Í evni fevna fyrilestrarnir um bæði ástøðiliga og verkliga orðabókafrøði í Norðurlondum. Støði verður tikið í orðabókaverkum, sum eru útkomin, og ymiskt í verkætlanum, sum eru ávegis.

- Hvussu nýggj tøkni og tradisjónelt orðabókaarbeiði verður sameinað er eitt áhugaverdur spurningur, sigur Zakaris Hansen.

Nakrir føroyingar halda fyrilestur, eitt nú Jógvan í Lon Jacobsen, málfrøðingur, sum fer at røða um orðabókafrøði og terminologi. Johnny Thomsen fer at greiða frá russisk-føroysku orðabókini hann er í holt við, og Kirstin Didriksen, frá lærda háskúlanum í Gøteborg, heldur fyrilestur um kynsperspektivið í føroyskum orðabókum. Ulf Timmermann, studentaskúlalærari, fer at tosa um arbeiðið við føroysk-týsku orðabókini, hann er í holt við at gera, Gianfranco Contri, sum arbeiðir á Føroyamálsdeildini, sigur somuleiðis frá arbeiði sínum við føroysk-italsku orðabókini, hann arbeiðir við. Heitið á fyrilestri, sum Anna Braasch frá lærda háskúlanum í Keypmannahavn heldur er: Er munur á Føroyum og Filipsoyggjunum?, og Valerij Berkov frá lærda háskúlanum í Sankta Pætusbrog heldur fyrilestur um føroyska orðabókgerð. Hópin av øðrum fyrilestrum eru á skránni.

Á Føroyamálsdeildini arbeiða fólk við eini føroyskdanskari orðabók, eini nýútgávu av teirri hjá Christian Matras, sum kom út fyri nógvum árum síðani. Eisini ein fakorðabók millum annað við orðum innan oljuvinnu er í gerð á Føroyamálsdeildini. Arbeiðið er komið væl áleiðis, men hevur ligið stilt vegna vantandi fígging.



*- Hvussu nýggj tøkni og tradisjónelt orðabókaarbeiði verður sameinað er ein áhugaverdur spurningur, sigur Zakaris Hansen, sum vegna Føroyamálsdeildina samskipar ráðstevnuna*

# ítróttur

Nr. 160 • mikudagur • 22. august 2001 • 75. árgangur • www.sosialurin.fo

# Bronsa til Danmark

**Danska unglingalandsliðið fekk bronsu í HM-kappingini, sum varð spæld herfyri**

BRIDGE
*Bogi Simonsen*
*og Arnbjørn Sivertsen*



Í døgunum 6-15. august var unglinga HM í bridge spælt í Brasil. Norðurlond vóru umboðað av Noregi og Danmark, og megnaði Danmark at enda á triðja sæti.

Úrslitið í innleiðandi umfarinum, har øll liðini spældu ein dyst móti hvørjum (round robin), var hetta:

| | | |
|---|---|---|
| 1 | USA1 | 324 |
| 2 | Thailand | 290 |
| 3 | Danmark | 282,5 |
| 4 | Ísrael | 282 |
| 5 | Kina | 275 |
| 6 | Noreg | 271 |
| 7 | Niðurlond | 270 |
| 7 | Kanada | 270 |
| 9 | Argentina | 270 |
| 10 | Frakland | 266 |
| 11 | Australia | 256,5 |
| 12 | Brasil | 251,5 |
| 13 | USA2 | 235,5 |
| 14 | Egyptaland | 223 |
| 15 | Kin. Taipei | 208 |
| 16 | CAC | 190 |
| 17 | Ný Sæland | 159 |

Fýra tey fremstu komu í semifinalurnar. Nevnast kann, at einastu ferð í hesi jøvnu og spennandi kappingini Danmark taldist millum fýra tey fremstu, var eftir 17. og seinasta umfar!

Í finaluna komu USA og Ísrael, meðan Danmark skuldi spæla um bronsumedaljurnar ímóti Thailandi. Úrslitini vóru:

**Finalan:**
USA1 – Ísrael 262 – 156 imp

**Bronsudysturin:**
Danmark – Thailand 191 – 123,5 imp

Vit ynskja donsku frændum okkara hjartaliga tillukku við úrslitinum.

**Eitt spæl**

Í Bulletin 1 frá HM kappingini fyri unglingar stóð hendan uppgávan:

**Gevari: Norður**

Í hættu: E-V

Norður
Q4
63
AKJ109
AKJ10

Vestur
AK10953
A10
84
872

| V | N | E | S |
|---|---|---|---|
| - | 1rú | pass | 1hj |
| 1sp | 3kl | pass | 3hj |
| pass | 3sp | pass | 4hj |
| pass | pass | pass | |

Tú tekur fyri sp ess og kong, og makkarin spælir fyrst sp2 og síðan sp8, sum eftir tykkara avtalum lovar eitt ólíka tal. Sært tú nakran møguleika at seta kontraktina?

Soleiðis sá alt spælið út:

Norður
Q4
63
AKJ109
AKJ10

| Vestur | | Eystur |
|---|---|---|
| AK10953 | | J82 |
| A10 | | J4 |
| 84 | 7532 | |
| 872 | 9643 | |

Suður
76
KQ98752
Q6
Q5

Tú sært tað kanska nú? Vestur má spæla enn ein spaðara til dupult renonce hjá spælførara. Tá hann kemur inn uppá trumfess, spælir hann fjórðu ferð spaðara, so makkarin kann trumfa við dreinginum. Nú geva hj10 mótspælinum tað fjórða stikkið, og kontraktin fer niður.

Kanska hevur tú ein so góðan makkara, sum eisini sær eina trumfremjing sum einasta møguleika at seta kontraktina, so hann í teimum báðum fyrstu stikkunum markerar doubleton fyri at tryggja sær, at tú spælir spaðaran triðju ferð!

**Feløgini byrja aftur**

Annars nærkast tíðan, tá feløgini aftur byrja við teimum regluligu spælikvøldunum. Hevur tú funnið tær ein makkara til veturin?

## Dystir komandi vikuskiftið

**Í blaðnum í gjár restaði dystaryvirlitið fyri fótbóltslandskappingina til komandi vikuskiftið. Dómarayvirlitið er nú tøkt, og verða dystirnir hesir**

**1. deild menn**

| | | |
|---|---|---|
| 26.08 | GÍ-VB | Lassin Isaksen |
| 26.08 | KÍ-B71 | Birgir Sondum |
| 26.08 | HB-NSÍ | Niclas á Líðarenda |
| 26.08 | B68-EB/S | Suni Johansen |
| 26.08 | FSV-B36 | Páll Augustinussen |

**2. deild menn**

| | | |
|---|---|---|
| 25.08 | Skála-LÍF | Dagfinn Olsen |
| 25.08 | NSÍ-KÍ | Erling Eysturoy |
| 25.08 | HB-Sumba | Jógvan A. Jacobsen |
| 25.08 | ÍF-TB | Petur Hansen |
| 25.08 | GÍ-B25 | Jón Kári Frederiksen |

**3. deild menn**

| | | |
|---|---|---|
| 26.08 | GÍ-VB | Edvard Højgaard |
| 26.08 | KÍ-B71 | Jógvan A. Jacobsen |
| 26.08 | AB-Royn | Georg N. Rasmussen |
| 26.08 | B68-TB | Dia Lamhauge |
| 26.08 | ÍF-B36 | Jónleif Gerðisá |

**1. deild kvinnur**

| | | |
|---|---|---|
| 26.08 | KÍ-VB | Berint Andreasen |
| 26.08 | B68-HB | Dan Højgaard |
| 26.08 | B71-B36 | Laurits í Króki |

## Svend Novrup vitjar í Føroyum

**Bridgesambandið fær í næstum vitjan av navnframa danska bridgespælaranum, sum eisini fer at halda skeið**

BRIDGE
*Bogi Simonsen*
*og Arnbjørn Sivertsen*

Navnframi blaðmaðurin, telvarin og bridgespælarin, Svend Novrup vitjar í Føroyum í døgunum 29. august til 4. september. Vitjanina hava Eyðun Anthoniussen og nevndin í FBS fingið í lag.

FBS skipar fyri ymsum skeiðum saman við Novrup í samband við vitjanina. Hetta verða skeið fyri tann vanliga bridgespælaran, fyri nevndarlimir og so eitt eitt skeið fyri teir meir ambitiøsu spælararnar, har tosað verður um landsliðsarbeiði. Skeiðini verða øll í Bridgehúsinum í Havn.

**Skráin verður henda:**
**Hóskvøldið 30. august kl 19**
Skeið fyri nevndarlimum, kappingarleiðarum og øllum, sum hava áhuga fyri umsiting og røkt av einum bridgefelag. Tosað verður m.a. um kappingarformar, og hvussu arbeiðast kann við at fáa stuðlar til eitt felag.

Kostnaðurin fyri hetta skeiðið er kr. 100,- fyri hvønn – skeiðstilfar og kaffi íroknað.

**Fríggjavøldið 31. august kl 19 – 23**
**og leygardagin**
**1. september kl 13 – 22**
Skeið fyri allar bridgespælarar.

Hetta skeiðið fer mest at snúgva seg um meldingar og spæliteori. Serligur dentur verður lagdur á doblingar, innmeld, víðari meldingar og mótspælsteori. Løgd spøl verða spæld.

Kostnaðurin tilsamans fyri báðar dagarnar er kr. 300,- fyri hvønn luttakara. Íroknað er skeiðstilfar, kaffi, køkur og spæligjald fyri kappingina sunnudagin.

**Sunnudagin**
**2. september kl. 14**
Opin parakapping í Bridgehúsinum.

**Mánakvøldið**
**2. september**
**og týskvøldið**
**3. september kl. 19**
Skeið fyri landsliðsáhugaðum spælarum – menn, kvinnur og unglingar. Evnini verða m.a. tann mentala fyrireikingin til kappingar og gjøgnumgongd av meldisystemum hjá teimum einkultu pørunum.

Allir áhugaðir bridgespælarar eru vælkomnir til skeiðið – eisini teir sum ikki her og nú ætla sær á landsliðið. Skeiðið er ókeypis.

Tilmelding til okkurt av hesum skeiðunum hjá Eyðuni Anthoniussen tel 218585 ella 448166 og hjá Marjun Restorff tel 319142 skjótast gjørligt. Avmarkað luttøka til øll skeiðini.